# Stórur áhugi fyri Dinero

**Í gjárkvøldið spældu fólk fyri fyrstu ferð Dinero á Rás2, og áhugin fyri spælinum var stórur.**




Rás2 er farið undir nýtt bingospæl. Spælt varð fyrstu ferð sunnukvøldið, og ætlanin er, at Dinero, sum spælið kallast, skal verða á skránni sunnukvøld frameftir.

Hesaferð vóru bingoplátur sendar í hvørt hús í landinum, men fólk høvdu eisini tryggjað sær fleiri plátur við at keypa tær á sølustøðunum.

- Vit fegnast um stóru undirtøkuna fyri Dinero, og vit framhaldandi at bjóða okkara lurtarum eitt gott og spennandi spæl, sigur Birgir Waag Høgnesen, marknaðarleiðari á Rás2.

Spælið í gjárkvøldið gekk væl, men onkrir byrjanartrupulleikar vóru. Fleiri hildu, at tølini vóru lisin ov skjótt, men ferðin verður sett niður, so fólk frameftir kunnu spæla við fleiri plátum samstundis.

Fyrsti vinnarin í Dinero spælinum var Hans Pauli Sjóstein, sum vann gávukort frá Bowlinghøllini í Havn. Maria Christiansen vann fartelefon frá Føroya Tele, og Ida Nielsen vann ferðina við Atlantsflogi.

Komandi vikuskifti verður aftur spælt Dinero, og av tí at páskirnar nú koma, verður spælt leygarkvøldið kl. 19.30.







